## Torkil FM-vinnari súkkling

FM í einkultstarti var í Vágum sunnudagin, har kappast var hjá unglingum, kvinnum, monnum og menn +40. Hjá monnunum vann Torkil Weyhe. Hann súkklaði teir 30 kilometrarnar við tíðini 42.25. Gunnar D. Olsen og Sverri M. Edvinsson vóru honum næstir við tíðunum 45.51 og 47.50. Súsanna Skylv Sørensen vann kappingina hjá kvinnum við tíðini 52.50, og Marin E. Heinesen gjørdist nummar tvey við tíðini.1.05.20. Unglingarnir súkklaðu 20 kilometrar í mun til tey vaksnu, og her vann Jóanis Albert Nielsen við tíðini 43.24. Hjá monnum omanfyri tey 40 vann Andras Joensen kappingina við tíðini 49.21, Jógvan Djurhuus varð nummar tvey við tíðini 55.15, og Evald Rasmussen nummar trý við tíðini 56.51.



## Rógvi spældi á Varmakeldu

Rógvi Jacobsen hevur spælt sín fyrsta dyst við ÍF. Hetta gjørdi hann á Varmakeldu, tá fuglfirðingar spældu stevnudyst í móti U21-landsliðnum. – Tað kendist gott at vera á vøllinum aftur. Eg gjørdi ikki so nógv av og var eitt sindur varin, sigur Rógvi Jacobsen. Hann skuldi upprunaliga einans spæla eitt korter, men tá alt kom til alt, spældi klaksvíkingurin ein hálvan tíma. Nú fer Rógvi Jacobsen so at royna at venja í næstu viku, og vónar hann, at hann verður tøkur til seinnu hálvu. ÍF tapti annars dystin 2-4 og Rógvi Jacobsen var ikki millum málskjúttarnar.

# Burtur við trupulleikunum

**Føroysku bogaskjúttarnir høvdu eitt loynivápn við sær á Oyggjaleikum**




Jákup Mørk

Liðleiðarin hjá føroysku bogaskjúttunum á Oyggjaleikum, Per Holm Andersen, hevði eina helst serliga uppgávu at røkja fyri liðið hesaferð.

Tað var nevnliga hansara lutur at bera allar trupulleikar, sum skjúttarnir høvdu, soleiðis at hesi einvíst kundu hugsa um skjótingina.

- Undan kappingunum – ella um tey brádliga skjóta illa – fari eg til skjúttarnar við mínum keppi. Og boðini til skjúttarnar eru púrasta greið. Tey skulu taka sínar húgvur, og oysa allar trupulleikar og forðingar yvir í mín kepp, tí eg skal ikki skjóta kortini.

- Og tað sær út til at rigga. Fyrsta dagin gekk ikki nakað serligt, men síðani hava tey skotið sum einglar, segði Per Holm Andersen, tá vit tosaðu við hann á leikunum hósdagin.

Og her á blaðnum fáa vit bara givið honum rætt. Við seks gullmerkjum gjørdu førosyku skjúttarnir í øllum førum sítt í metstóru heiðursmerkjainnsavnanini.



Eggaba Andreasen letur her Peri sínar negativu tankar, og so er bara at skjóta

Mynd: Álvur Haraldsen

# Føðingardagsgáva til Hilmar Jan

**Beint undan fráferðini fekk føðingardagsbarnið serstaka gávu handaða frá Flogbóltssambandinum**




Jákup Mørk

Beinleiðis frásagnir frá øllum flogbóltsdystunum við føroyskari luttøku vóru sjálvsagdur partur av tíðindaflutninginum hjá Rás2 á Álandi.

Og tað var eftir øllum at døma nakað, sum var follið í serstakliga góða jørð hjá teimum báðum føroysku flogbóltslandsliðunum.

Hilmar Jan hevði nevnliga føðingardag sama dag, sum leikirnir endaðu, og á flogvøllininum beint norðanfyri Mariehamn, fekk hann serstaka føðingardagsgávu frá flogbóltsliðunum.

Gávan var ein dystarbóltur frá leikunum, har allir spælarar á bæði mans- og kvinnulandsliðnum høvdu sett sín autograf á, og tað var eitt errið føðingardagsbarn, sum tók ímóti gávuni, skulu vit heilsa [illegible]




Hilmar Jan Hansen var ovurfegin fyri føðingardagsgávuna, sum hann fekk frá føroysku flogbóltslandsliðunum

Mynd: Álvur Haraldsen

## Sjálvandi skal fótbólturin við

**Tað líkist ongum – og í besta føri arrogansu – tá føroyskur fótbóltur ikki er partur av oyggjaleikunum**




Jákup Mørk

Føroysku oyggjaleikaluttøkurnar í fótbólti kunnu akkurát teljast á einari hond.

Fótbóltur gjørdist partur av skránni á leikunum í Føroyum í 1989, og hesa ferð og á Álandi í 1991 vunnu føroysku menninir gull. Og tað sama gjørdu kvinnurnar í 2001, 2003 og 2005.

Tað kann væl vera, at tey allarfremstu hjá føroysku fótbóltslandsliðunum hava tørv á øðrum og størri avbjóðingum, men tað eigur ikki einvíst at útiloka føroyskari fótbóltsluttøku á leikunum.

Hví ikki senda eitt ligalandslið – altso uttan útisetarnar – ella kanska eitt føroyskt U21-landslið á leikirnar? Og hví ikki senda til dømis eitt U21-landslið hjá kvinnum avstað?

Frá venjaratoyminum kring landsliðini hevur eitt tað størsta kritikk-punktið verið, at venjingardystirnir eru ov fáir, og her er eitt gylt høvi at fáa fleiri av slagnum innanfyri eina intensa fótbóltsviku.

Og so eiga vit ikki at gloyma, hvønn týdning oyggjaleikirnir hava havt fyri føroyskan fótbólt. Tað var júst luttøkan á leikunum í 1989, sum sannførdi leiðsluna í FSF um, at tað var neyðugt at taka stigið fult út, og bara tað í sjálvum sær ger, at FSF eigur at vísa stórt takksemi mótvegis leikunum.

Sum fótbóltstjóð eru Føroyar hartil eisini ein tann størsta fyrimyndin hjá flestu av luttakandi oyggjunum. Føroyski altjóða limaskapurin. Tey úrslit og tann framgongd, sum føroyskur fótbóltur hevur havt hesi árini, er nakað, sum allar hinar oyggjarnar nýta sum fyrimynd í sínari stremban. Og eingin sum helst ivi er um, at føroysk luttøka á leikunum vildi verið nakað, sum øll hini fegnaðust um. Ikki minst, tí hetta eisini kundi verið ein góður mátistokkur hjá øðrum oyggjasamfeløgum at sammett seg við.

Tað kann væl vera, at tað gevur føroyskum fótbólti orsøk at fegnast, um vit á hendan hátt kunnu virka sum fyrimynd hjá øðrum. Men at vera fyrimynd gevur eisini ábyrgd, og einasti mátin, sum føroyskur fótbóltur kann vísa hesa, er við luttøku á Oyggjaleikum – helst í 2011.